# Frem telur fleiri føroyingar

**FÓTBÓLTUR**

**Seinastu árini hava sjey føroyskir landsliðsleikarar spælt við felagnum, sum eftir ÍF Føroyar má metast at vera føroyingafelagið í Danmark**



Mynd: Andras Kjartansson Thomassen

Rólant Waag Dam

Í løtuni eitur einasti føroyingurin í BK Frem Andreas Lava Olsen. Í fjør taldi felagið tríggjar føroyingar, tá Bogi Løkin og Jónas Þór Næs eisini royndu seg har. Tríggir mans, sum eisini eiga sítt pláss á føroyska landsliðnum. Bogi Løkin er í dag aftur heima í Føroyum, meðan Jónas Þór Næs nú spælir í Íslandi.

Áðrenn teir spældi Atli Danielsen í felagnum frá 2007 til 2009, har hann varð kosin ársins leikari og eisini var varaliðformaður. Atli Danielsen spælir í dag við FC Roskilde. Eisini Jón Rói Jacobsen spældi við BK Frem. Hann royndi seg í tveimum skiftum, seinnu ferðina saman við Atla Danielsen. Jón Rói Jacobsen var nógv raktur av skaðum, raðfesti lesnaðin og spælir ikki fótbólt á høgum støði í dag.

Tað ger Gunnar Nielsen hinvegin, ið er tann føroyski leikarin, sum hevur flutt seg longst, eftir at hava spælt við BK Frem. Hann var í felagnum í tvey ár, áðrenn hann skifti til Blackburn Rovers og síðani Manchester City, umframt at hava verið útleigaður til Motherwell, Wrexham og Tranmere Rovers.

Ein annar leikari, sum eisini hevur roynt seg aðrastaðni enn í Føroyum, eftir at hava spælt við BK Frem, er Atli Gregersen. Hann spælir í dag við Víkingi, men royndi seg eitt skifti í skotskum fótbólti.

Felags fyri allar hesar eru, at teir eru – ella hava verið – landsliðsleikarar.

# Venjarin spyr Lava um hjálp

**Síðani ÍF Føroyar trekti BK Frem í steypakappingini, hava bæði leikarar og venjarar tráðspurt Andreas Lava Olsen um føroyska felagið í Keypmannahavn. Leirvíkingurin hevur ávarað og sagt, at ÍF Føroyar avgjørt skal takast í álvara**

Rólant Waag Dam

– Bara tí, at eg eri føroyingur, rokna teir við, at eg veit alt um liðið og kenni hvønn einstakan leikara, flennir Andreas Lava Olsen, sum næstan hevur verið til avhoyringar hvørja venjing, síðani tað gjørdist greitt, at ÍF Føroyar og BK Frem bresta saman í donsku steypakappingini, Ekstra Bladet Cup.

Bæði leikarar og venjari hava spurt seg fyri, og Andreas hevur so roynt at greitt frá tí, hann veit. Flestu av leikarunum kennir hann frá føroysku landskappingini, um ikki persónliga so sum kappingarneytar.

– Men tað er sera ringt at meta um, hvar ÍF Føroyar liggur í mun til Frem. Fyri jól vóru úrslitini einki serligt, men nú eru teir vælkoyrandi og tað er farligt. Tá er ÍF Føroyar eitt sera sterkt lið. Tí havi eg eisini ávarað og sagt, at uppgávan skal stakast í stórum álvara, greiðir Andreas Lava Olsen frá.

Leirvíkingurin dylir tó ikki yvir, at ein sigur er eitt krav.

– Annars sleppa vit ikki víðari í kappingini, tað er so einfalt sum tað. Ikki minst aftaná tapið um vikuskiftið, mugu vit reisa okkum. Í so máta er nógv meira upp á spæl hjá okkum, enn tað er hjá ÍF Føroyum, heldur Andreas Lava Olsen.

– Leikararnir hjá ÍF Føroyum eru kanska eyka motiveraðir eisini, nú tað er Frem, teir møta, har nógvir føroyingar hava spælt. So kunnu teir vísa, at tað ikki er neyðugt at spæla aðrastaðni enn við ÍF Føroyum, sigur Andreas Lava Olsen.

rolant@sosialurin.fo



*Rókur av Fløtum Jespersen, royndasti leikarin hjá ÍF Føroyum, er eitt sindur smáskaddur undan dystinum í annaðkvøld. Tað sama er Rasmus Nolsøe*

*Mynd: Rólant Waag Dam*

# Stuttlig avbjóðing hjá okkum

**Rókur er vanur við stórar uppgávur. Á landsliðnum hevur hann dystast við franskmenn og fyri HB hevur hann skorað altjóða mál og vunnið fleiri Føroyameistaraheiti. Nú gleðir hann seg til enn eina avbjóðing, hesaferð við ÍF Føroyum í móti søguríka Frem**

Rólant Waag Dam

Tá Rókur av Fløtum Jespersen flutti til Danmarkar at lesa í 2007, segði hann samstundis farvæl við fleiri fótbóltsupplivingar. Onkrar hevur hann tó fingið, tá hann hevur spælt við HB í summarfrítíðunum, har hann eisini hevur spælt altjóða dystir og skotið mál. Men Rókur segði farvæl við landsliðið, sum hann var vorðin partur av júst tá. Framrættaði HB-arni spældi við í dystinum móti Frankaríki tað árið, umframt eisini í venjingardystinum í móti Íslandi. Men fleiri landsdystir gjørdist tað ikki talan um tá, tí Rókur raðfesti lesnaðin. Nú er líkt til, at framrættaði HB-arin fær eitt plástur upp á sárið, nú liðið skal dystast við BK Frem.

– At fáa henda møguleikan við ÍF Føroyum er ótrúliga stuttligt. Frem er eitt felag við eini ríkari søgu, og við einum tiltiknum loyalum fjepparaskara. Haraftrat hevur liðið fylgt nógv í føroysku fjølmiðlunum seinastu árini, og tað ger tað heila meiri spennandi hjá okkum, heldur Rókur av Fløtum Jespersen.

At talan er um eina ovurhondsstóra uppgávu, er eingin ivi um. Talan er um steypadyst, sum merkir, at tapir tú, so ert tú úti.

– Vit skulu spæla øll okkara kort heilt ótrúliga væl, um vit skulu hava nakran livandi kjans, sigur Rókur av Fløtum Jespersen.

### Vónar at fáa stuðul

Royndasti leikarin hjá ÍF Føroyum heldur kortini ikki, at liðfelagar hansara hava nakað at óttast. Heldur ikki stóru áskoðarafjøldina, sum møguliga verður til staðar á Valby Idrætspark í annaðkvøld.

– Tað er óhoyrt, at eitt lið í hesi deildini hevur nógvar hundrað áskoðarar til dystir sínar. Men tað hevur bara postiva ávirkan, eisini hjá okkum, tí vit skulu bara njóta tann stemningin, hetta skapar, ger Rókur greitt. Hann leggur tó aftrat, at hann vónar, at fleiri føroyingar í Keypmannahavn koma at stuðla ÍF Føroyum í samband við stóru avbjóðingina.

rolant@sosialurin.fo